

## Heini tapti

Seks mál frá føroyska Heini Hanusarson var ikki nokk til at steðga Skjern, tá ið liðini brustu saman í Helsingør arena í gjárkvøldið frammanfyri á leið 1000 áskoðarum. Heini Hanusarson og hansara liðfelagar taptu nevniliga dystin 29-23 ímóti fyrrverandi toppliðnum í donskum hondbólti, Skjern. Sjálvt um tað ikki hevur gingið heilt eftir vild hjá Skjern í ár, sum liggur á einum 7. plássi, so høvdu teir ikki stórvegis trupulleikar við at basa Helsingør. Liðið hjá Heina liggur enn í botninum og berjist fyri at yvirliva. Teir liggja í løtuni næstaftast við seks stigum.

## Svimjikapping um vikuskiftið

Havnar Svimjifelag skipar fyri svimjikapping í svimjihøllini í Gundadali um vikuskiftið. Kappingin er fyri bólkarnar 3 og eldri, tað vil siga fyri svimjarar, ið eru 12 ár og eldri. Hetta er seinasti møguleiki fyri teir svimjarar, sum enn ikki hava kvalifisera seg til FM í apríl, at gera tað. Harumframt er tað næst seinasti møguleiki at kvalifisera seg til Oyggjaleikirnar á Rhodos í summar. So tað verður spennandi at síggja, hvørjir svimjarar klára tað nú ella eru væl á veg.

# Kyndil byrjaði sum fráhaldsfelag

**Tá Kyndil varð stovnað fyri 50 árum síðani, var tað ikki sum eitt hondbóltsfelag, men sum ungdómsdeild hjá Losjuni í Havn. Í morgin gevur Kyndil út bók um søgu felagsins, ið Suni Merkistein hevur skrivað. Bókaframløga verður í Miðlahúsinum fríggjadagin klokka 16**

BÓKAÚTGÁVA
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Hondbóltsfelagið Kyndil hevur eina sera áhugaverda søgu, sum nógvir føroyingar helst ikki kenna upprunan til. Av fyrstan tíð var ikki talan um eitt hondbóltsfelag, men um eina ungdómsdeild hjá Losjuni í Havn.

Hetta er ein partur, sum rithøvundurin Suni Merkistein helt verða sera áhugaverdan og hevur tí gjørt nógv burtur hesum tíðarskeiðnum.




*Í morgin kemur bókin um 50 ára søguna hjá Kyndli, ið útvarpsmaðurin Suni Merkistein hevur skrivað*

*Keipa: Føroya Prent*

– Tá felagið heitti á meg um at skriva søgu felagsins, fekk eg fullkomiliga fríar hendur. Ein stórur partur eru myndir og hagtøl, har dentur verður lagdur á ítróttarligu gongdina hetta 50 ára tíðarskeiðið, sigur Suni Merkistein.

Rithøvundurin vísir á, at tey fyrstu nógvu árini leiktu liðini bert fimm-seks landskappingardystur um árið, og tí eru allir dystirnir umtalaðir tey fyrstu 25 árini. Eitt tíðarskeið tað eydnaðist Kyndli at vinna eini 18-19 føroyameistaraheiti.

Ein annar partur snýr seg um altjóða dystirnar og uttanlandsferðirnar.

Tann mest áhugaverdi parturin heldur rithøvundurin vera, hvussu felagið bleiv til og teir innanhýsis dystirnar um, hvør kundi sleppa á liðið. Leikararnir, sum ikki vóru organiseraði avhaldsfólk, sluppu ikki at leika við Kyndli.

Í nógv ár vóru nógvar rembingar og orðadráttir um júst hendan spurningin, og ikki fyrr enn í 1988 gjørdi felagið av á aðalfundi at loysa formliga frá Losjuni.

Í morgin fríggjadagin klokkan 16 verður bókin løgd fram í Miðlahúsinum í Vágsbotni.

Talan er um eitt rúgvusmikið verk upp á 700 síður.

# VÍF er Føroyameistari

VÍF vann Føroyameistaraheitið fyri dreingir 12B í gjár. Meistaraheitið varð staðfest við tveimum sigrum á Skála, áðrenn liðið fekk heiðursmerkini.

Bólkurin dreingir 12B eru dreingir, sum verða 12 í ár. VÍF hevur havt eitt sera gott kappingarár. Liðið hevur vunnið allar dystirnar uttan ein, tað var móti VB í Vági. Her vann VB við einum máli. VÍF fekk tó endurreisn fyri hetta tap í gjár, tá teir vunnu sannførandi 16-7 móti júst VB. Harumframt spældu Føroyameistararnir móti STÍF, og vunnu henda dyst við 14 málum móti 11.

Daniel Rapa er venjari hjá dreingjunum, og hevur verið venjari hjá teimum, síðan teir byrjaðu at spæla hondbólt. Í fjør varð hetta liðið greipuvinnari í sínum aldursbólki.

Í næstum fer steypakappingin í gongd, tá skulu teir spæla móti bæði B liðunum og A liðunum, í eru dreingir, ið eru eitt ár eldri.



# Fleyr vann FM




*Fleyr fór avstað við øllum, tá gentur 10 ár spældu FM-kapping í flogbólti um vikuskiftið*

**Farna vikuskiftið var FM á skránni í flogbólti hjá gentum 10 ár, og her lat Fleyr ongan iva vera um, hvat var besta liðið. Tær vunnu nevniliga bæði gull- og silvurheiðursmerki**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Næstseinasta vikuskiftið var FM á skránni í yngri deildum, og einasti aldursbólkur, sum ikki spældi hetta vikuskiftið, vóru gentur 10 ár.

Um vikuskiftið skuldu hesar tó kappast um meistaraheitið, og í undanfarnu kappingunum hava liðini hjá Fleyr fingið sera góð úrslit. A-liðið hevur vunnið bæði FK-kappingini, Mjølnir-kappingini og Dráttur-kappingini, so tær vóru helst eisini favorittar undan FM-kappingini.

Tað vísti seg eisini, at Fleyr fór avstað við tí mesta henda dagin. Í finaluni møttust Fleyr a og Fleyr b nevniliga, og her var a-liðið sterkari. Tær tóku sær av gullinum, meðan b-liðið vann silvurheiðursmerki.

ÍF hevur verið einasta liðið, sum veruliga hevur hótt Fleyr í ár, og ÍF megnaði eisini at vinna dystin um triðja plássið, og sostatt fingu tær bronsuheiðursmerki.